**Lýsing av umhvørvinum (ísmb við core og 802.1x)**

Ætlanin er at brúkarar í skúlanet koma at verða á einum on-prem active directory, ið verður hýst á øðrum av datacentrunum hjá KT Landsins – hetta verður síðan synkronisera ímóti Azure. Eisini verður DNS, DHCP og skjalhald hýst í datacentrinum, umframt at starvsfólk á skúlunum koma at printa umvegis print servara í eisini verður hýstur í datacentrinum. Næmingar printa tó umvegis cloud.

**Core AAS**

Á spurnarfundinum var spurt um ikki tað var rættast at prísurin fyri core eisini var bjóðaður sum "AAS", soleiðis at prísurin fyri core ikki bleiv deildur út á aðrar postar.

Vit hava valt at ganga hesum á møtið, og er rætting tí gjørd í excel arkinum (fylgiskjal 6).

Onkur nevndi eisini at punkt B í prísskjalinum (Prísur fyri uppseting av management og centralum dashboard) eisini burdi verið sum AAS ella saman við punkt A.

Her skal sigast at tankin við B er at talan er um uppseting av zeroconfig o.s.fr., og tað hoyrir tí ikki saman við core. Hetta verður tí óbroytt.

**Goymslupláss ísamband við loggar**

Krav 22 nevnur at loggar skulu goymast í minsta lagið eitt ár – tað var nevnt at hetta kundi koma at verða kostnaðarmikið at goyma, og spurt var um man hugsaði at storage skuldi verða partur av útboðnum.

At goyma loggar í minsta lagið eitt ár, er í nógvum førum kanska í longra lagið, og tí er væl hugsandi at hetta verður broytt seinni. Um loysnin hjá veitarnum leggur upp til at goyma loggar on-prem, er hugsanin ikki at veitarin skal veita goymslupláss. Ístaðin verður annað goymsupláss hjá KTL brúkt.

Um goymslupláss til loggar er partur av einari heildarveiting, so kann veitarin tó lata goymsluna verða við í tilboðnum, og tað verður harvið vekta positivt í samband við kvalitet.

**Ósamsvar millum fylgiskjal 1 og fylgiskjal 5**

Tað kom fram á fundinum, at tað í nøkrum førum ikki var samsvar ímillum krøvini ”Servicekrav: Beskrivelse af SLA og responstider” í Fylgiskjal 1 og ”Fylgiskjal 5 - Rakstrarveitingar og tænastustig.docx”

Reaktiónstíð

Tað er ymiskt hvat skjølini siga um reaktiónstíð. Okkara útgangsstøðið er tað ið stendur í excel arkinum. Tað vil siga mánadag til fríggjadag frá 7:30 til 16:00 og ein reaktiónstíð á 15 minuttir.

Har útyvir, verður rokna við at yvirvakingin hevur serligan ans ísamband við landsroyndir og aðrar royndir – hetta kemur serliga at verða galdandi í byrjanini.

Service vindeygu

Tað er ymiskt hvat skjølini siga um service vindeygu. Her verður útgangsstøðið tað ið stendur í Fylgiskjal 1.

| Uge * | Varighed | Tidsrum hvor det er muligt at gøre vedligehold |
|---|---|---|
| 1 | 2 timer | Tirsdag og fredag aften fra kl. 17:30-19:30 |
| 2 | 2 timer | Tirsdag og fredag aften fra kl. 22:30-00:30 |
| 3 | 2 timer | Tirsdag og fredag aften fra kl. 17:30-19:30 |
| 4 | 5 timer | Natten til onsdag fra kl. 00:00-05:00 |
| 5 | 2 timer | Tirsdag og fredag aften fra kl. 22:30-00:30 |
| | | Gældende for de mdr. hvor der er 5 tirsdage. |